## HEILSANIR



**Góði fitti Árant**
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum tann 27. des. Fastir er so góð við teg.
**Kærar heilsanir Monika-fastir**



**Góða Bjørk**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Eisini ein heilsa til Bein. Jesuspápi signið tykkum.
**Kærar heilanir omman og abbin í Vági**



**Góði Hans Jacob**
Vit ynskja tær og pápa tínum hjartaliga tillukku jólaaftan.
**Heilsan frá ommu og abba**






**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:....................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ......................................................................
Bústaður: .................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«


**Ymiskt**

**CANON EOS 300**
myndatól til sølu fyri 1.000 kr. Sera lítið brúkt.
*Tlf. 553600*

**DUPULT PARABOLHØVD YNSKIST**
við 2 útgangum ella eitt stativ sum 2 høvd kunnu verða fest á parabolina við, ynskist til keyps.
*Tlf. 361452*

**TIL SØLU**
Ein Samsung E700 fartelefon við tilhoyr. Til sølu fyri einans 1500 kr. Lítið brúkt.
*Tlf. +45 26835198*

**BYRSA YNSKIST TIL KEYPS**
Eigur tú eina gamla byrsu við hana at selja mær? Ger einki um hon er illa farin, skal brúkast sum antik.
*Tlf. 333399*

**MODELSKIP**
til at gera liðugt sjálvur, model AWI 33 úr glasfipur 105 cm. Einans kr.2.000,-
*Tlf. 583270*

**NOKIA 3510i**
Ein spildurnýggj (ikki brúkt) nokia 3510i til sølu fyri 650,-kr.
*Tlf. 32 861312 ella 26 394786*
*uniklas@hotmail.com*

**JÓLAGÁVAN!**
So at siga óbrúkt trummusett av slagnum Pearl Target til sølu fyri 4.500,-
*Tlf. 253167/371844*

**TIL SØLU 14,44 M**
Til Sølu 14,44 Scanparkett MagnumParket Nordic D/Bøg + M/LakNy prísur 319,00 Dkr + mvg m.Kann heintast í Havn fyri 150,00 Dkr m.
*Tel: 214053*

**PUMPGUN**
Mossberg pumpgun, model 835, 5+1 skot, valnøtuskefti, til sølu. Byrsan er 3 ára gomul, men lítið brúkt. Prísur: 3500 kr.
*Tlf. 226425*

**MALLIR**
til føroyska búnan (Smæran) seljast samlaðar fyri 1200.00 kr
*Tlf. 271900*

**TIL SØLU**
Ein Nokia 8210 500 kr. Ring og hoyr meiri.
*Tlf. 263862*

**EITT NOKIA CAMERA**
kann brúkast itl allar Nokia telefonir sum hava litskerm, til sølu fyri 450,-
*Tlf. 269206*

**EIN NOKIA 3100**
fartelefon til sølu, hálvt ára gomul, virkar væl. Bert 950,- kr. Eyka cower fylgir við.
*Tlf. 269206*


# Ætla at útbyggja leguhúsið í Nesvík

**Ein bygginevnd við Jeffri Johannesen sum formanni arbeiðir nú við einum uppskoti um, hvussu leguhúsið í Nesvík kann útbyggjast í framtíðini**

ÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Jú, tað er rætt, at ein bygginevnd við mær sum formanni arbeiðir við ætlanunum um, hvussu leguhúsið í Nesvík kann útbyggjast. Men enn er einki lagt fyri høvuðsstýrið til støðutakan – og tað fer at taka sína tíð, áðrenn vit eru komin so langt við hesum arbeiði.

Jeffri Johannesen sigur, at tá ið leguhúsið í Nesvík varð bygt og tikið í nýtslu fyrst í nítiárunum, var hetta fyrsta byggistig av trimum, sum ætlanin er at fremja.

### Trongligt

– Tað er alt ov trongligt í húsinum, tá ið legur eru, og tørvur er serliga á høllini, sum ætlanin er at byggja suður úr verandi bygningi.

Hann sigur, at bygginevndin enn ikki hevur tikið støðu til, um byggjast skal ein ítróttarhøll í fullari støddd – ella um talan verður um eina minni høll.

Jeffri sigur seg ikki duga at siga, nær bygginevndin verður liðugt við sítt arbeiði, tí hetta er eitt arbeiði, sum má grundast bæði væl og virðiliga, sum hann tekur til.

– Tað kostar pening at útbyggja leguhúsið, og hesir skulu útvegast, um ætlanin skal fremjast í verki, sigur hann.

### Long "prosess"

Formaðurin í bygginevndini sigur, at málið í fyrsta lagi snýr seg um, at nevndin er farin at hyggja at, hvørjir møguleikarnir eru at útbyggja karmarnar um leguhúsið í Nesvík.

– Talan er um stórarbeiði, og tí verður arbeiðið hjá bygginevndini eisini ein longri "prosess", har mong atlit skulu takast. Tá ið vit eru komin undir land við okkara tilmæli, verður tað lagt fyri høvuðsstýrið til støðutakan, sigur Jeffri Johannesen, sum eisini er stjóri á Sjómansheiminum í Havn.



*– Tað er alt ov trongligt í húsinum, tá ið legur eru, og tørvur er serliga á høllini, sum ætlanin er at byggja suður úr verandi bygningi, sigur Jeffri Johannesen, formaður í bygginevndini*

# Jólatrøll á nýggjárinum

JÓLABRYGGJ
*Vilmund Jacobsen*

Jólatrøllið, sum er jólabryggið hjá P/F Restorffs Bryggjaríi, var uppi seint tollaksmessukvøld.

Jóhan Mortensen sigur, at bryggjaríið fer at gera eina tapping aftrat, soleiðis at fólk eisini fáa høvi at hava jólatrøll aftur við nýggjárskvøldinum komandi vikuskiftið.

### Stórur vøkstur

– Sølan av jólatrøllinum hevur verið 53,5% hægri í ár enn í fjør, og nú fólk hava heitt á okkum um at fáa fleiri fløskur á marknaðin, hava vit gjørt at at gera eina tapping aftrat.

Hann sigur, at pilsnarin, Tarvurin, eisini er vorðin rættiliga áhugaverdur millum tey ungu.

– Hesin hevur meira av munchenermalti og meira av kolsýru, sum teimum ungu dáma væl, sigur Jóhan Mortensen á Restorffs Bryggjaríi.